## Byggifrøðingur, verkfrøðingur ella arkitektur
# til Tilbúgvingarstovn Føroya

Starv sum byggifrøðingur, verkfrøðingur ella arkitektur á Tilbúgvingarstovni Føroya, innan virkisøkið brunaumsjón, er leyst at søkja. Til rætta fólkið er talan um eitt áhugavert, fakliga krevjandi og persónliga mennandi starv.

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðsuppgávur hjá Brunaumsjón landsins eru m.a. hesar:

- Eftirlit við sløkkiliðum, sløkkiútgerð og tilkallingarskipanum
- Ráðgeving, vegleiðing og undirvísing í brunatrygdarligum viðurskiftum sambært brunalóggávuni
- Brunatøknilig málsviðgerð av fjøltáttaðum byggimálum o.t.
- Rakstrareftirlit við bygningum o.t.
- Loyvisgevandi myndugleiki í sambandi við stovnseting, flutning, goymslu og nýtslu av eldfimum og spreingikvæmum evnum
- Gera uppskot til kunngerðir og vegleiðingar innan brunatrygdarliga økið o.a.

Roknast má við nakað av ferðing millum oyggjarnar og uttanlanda.

**Fakligur førleiki**
Sóknast verður eftir byggifrøðingi, verkfrøðingi ella arkitekti. Ynskiligt er, at umsøkjarar harumframt hava kunnleika til ella royndir innan sløkkilið, brunatøkniliga byggimálsviðgerð ella hægri serútbúgving innan brunatøkni.

Tann, ið settur verður, má rokna við eftirútbúgving innan- og uttanlands á serøkjum sum brunatrygd, sløkking og bjarging.

Dentur verður lagdur á góðar persónligar eginleikar, at setti persónurin er fyrikomandi, hevur góð samstarvsevni, dugir at skipa sítt arbeiðsøki og at taka sjálvstøðugar avgerðir.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Tænastustaðurin er á skrivstovuni í Tórshavn.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda til Tilbúgvingarstovn Føroya, Tinghúsvegi 64 Tórshavn og skulu vera skrivstovuni í hendi innan 5. februar 2007. Brævbjálvin eigur at merkjast »starv á Brunaumsjón landsins«.

Nærri upplýsningar um starvið kunnu fáast frá Peturi Olsen, deildarstjóra á tlf. 35 66 10 ella 21 50 46. Teldupostur: plo@brl.fo



# Býr ein verkførari í tær?

**P/F Ivan Johansen Bilar søkir eftir búnum lærlingi M/K til verkføraraskrivstovuna.**

**Sum lærlingur** á verkføraraskrivstovuni ert tú ein týðandi partur av virksemi felagsins, av tí at tú í felag við verkføraran hevur ábyrgdina av samskiftinum við viðskiftafólk okkara eftir bilakeypið.

**Uppgávurnar fevna m.a. um:**
- Móttøka
- Innskriving
- Fakturering
- Annað fyrifallandi arbeiði

Tekniskur kunnleiki til bilar er ikki neyðugur, men tó ein fyrimunur.
**Neyðugt er**, at tú ert virkisfús/ur, álítandi og leggur dent á kundatænastu.
**Løn eftir avtalu**.

**Send** eina umsókn ella teldupost **innan 1. februar 2007** til:
P/F Ivan Johansen Bilar • Postbox 3205 • Hoyvíksvegur 63 • FO-110 Tórshavn • ivan@ivan.fo

*P/F Ivan Johansen Bilar er einasta ISO góðkenda bilasøla í Føroyum. Felagið bleiv stovnað í 1971 og hevur støðugt ment seg til at verða ein av størstu bilasølum í landinum. 23 fólk starvast hjá P/F Ivan Johansen Bilum, og felagið umboðar Mercedes-Benz, Citroën, Mitsubishi, Chrysler, Jeep og Dodge.*

DNV

CHRYSLER Jeep CITROËN Mercedes-Benz

## Ivan Johansen Bilar

Hoyvíksvegur 63 · Postboks 3205 · 110 Tórshavn · tel 31 36 66 · ivan@ivan.fo · www.ivan.fo

DIMMALÆTTING 341200


Hvønn dag í januar mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.

Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.

Sendið okkum loysnina innan mikudagin 5. februar 2007 kl. 10.00 og viðmerkið brævbjálvan »Sudoku«.

Vinningur í januar er 2 flogferðaseðlar við Atlantic Airways. Virði Kr. 4.380,-

Drigið verður fyrstu vikuna í februar.

Fyri at vera við í kappingini, skal øll uppgávan verða loyst.

## JANUAR-KAPPINGIN

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2 | 6 | | | 3 | | 4 | | |
| | | 3 | | | 1 | | | 7 |
| 5 | | | | | | 1 | | |
| 1 | | | 3 | | | | | |
| 7 | | | | 9 | | | | 5 |
| | | | | | 5 | | | 8 |
| | | 9 | | | | | | 4 |
| 4 | | | 6 | | | 2 | | |
| | | 8 | | 2 | | | 9 | 1 |

ATLANTIC AIRWAYS

**Navn:** ____________________

**Bústaður:** ____________________

**Telefon:** ____________________

Sendið til: Sosialin · Boks 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan »Sudoku«

## Vinningurin í januar

2 flogferðaseðlar við Atlantic Airways. Virði Kr. 4.380,-




# SUDOKU

Sosialurin